Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Løgtingið

Dagfesting: 3. august 2020
Mál nr.: 20/00301-22
Málsviðgjørt: JTN
Eftirkannað: 14. juli 2020

Løgtingsmál nr. 1/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um val til allar føroyskar kommunur og í løgtingslóg um val til Løgtingið
(Valrætt til persónar, sum hava fingið rættarliga myndugleikan frátiknan, hjálp til atkvøðugreiðslu o.a.)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um val til allar føroyskar kommunur og í løgtingslóg um val til Løgtingið
(Valrætt til persónar, sum hava fingið rættarliga myndugleikan frátiknan, hjálp til atkvøðugreiðslu o.a.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum broytt við løgtingslóg nr. 36 frá 26. apríl 1974, løgtingslóg nr. 98 frá 18. oktober 1984, løgtingslóg nr.105 frá 9. november 1984, løgtingslóg nr. 110 frá 6. oktober 2000, løgtingslóg nr. 66 frá 11. oktober 2004, løgtingslóg nr. 67 frá 11. oktober 2004 og løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 1 verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 3.* Hóast stk. 1, litra a, hevur persónur, sum er undir verjumáli og hevur fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir Værgemålsloven § 6, sum sett í gildi fyri Føroyar við kongligari fyriskipan, valrætt og valbæri til kommunuval."
Stk. 3-4 verða eftir hetta stk. 4-5.

2. Í § 4, stk. 5 verður "bygdarráðið/býráðið á fundi í seinasta lagi dagin fyri valið rætta hetta" broytt til: "hetta rættast til og við valdagin".

3. § 15 verður orðað soleiðis:

"**§ 15.** Um veljari møtir til val og sigur seg ikki føran fyri einsamallan at greiða atkvøðu á ásettan hátt, kann hann fáa hjálp til hetta frá tveimum limum í valnevndini, valstýrinum ella hjálparfólkum.

Stk. 2. Um veljari ikki er førur fyri at koma sær inn í valhølið, kann hann krevja, at atkvøðugreiðslan fer fram beint uttan fyri valhølið, og skulu í hesum føri tveir persónar, sum eru limir í valnevndini, valstýrinum ella hjálparfólk vera hjástaddir, og um neyðugt veita honum hjálp við atkvøðugreiðsluni.
Stk. 3. Veljarin kann krevja, at annar av persónunum, sum veitir hjálp við atkvøðugreiðsluni, sbrt. stk. 1 ella 2, verður skiftur út við ein persón, sum veljarin sjálvur vísir á.
Stk. 4. Limir í valnevndini, valstýrinum, hjálparfólk og persónar, sum veljarin sjálvur vísir á, hava tagnarskyldu, tá ið teir veita hjálp sbrt. stk. 1-3."

4. Í § 16, stk. 6 verður ", hefti" strikað.

§ 2

Í løgtingslóg nr. 49 frá 20. juli 1978 um val til Løgtingið, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 61 frá 26. mai 2010, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 26 verður orðað soleiðis:

"**§ 26.** Um veljari møtir til val og sigur seg ikki føran fyri einsamallan at greiða atkvøðu sum ásett, kann hann fáa hjálp til hetta frá tveimum limum í valnevndini, valstýrinum ella hjálparfólkum.
Stk. 2. Um veljari ikki er førur fyri at koma sær inn í valhølið, kann hann krevja, at atkvøðugreiðslan fer fram beint uttan fyri valhølið, og skulu í hesum føri tveir persónar, sum eru limir í valnevndini, valstýrinum ella hjálparfólk vera hjástaddir, og um neyðugt veita honum hjálp við atkvøðugreiðsluni.
Stk. 3. Veljarin kann krevja, at annar av persónunum, sum veitir hjálp við atkvøðugreiðsluni, sbrt. stk. 1 ella 2, verður skiftur út við ein persón, sum veljarin sjálvur vísir á.
Stk. 4. Limir í valnevndini, valstýrinum, hjálparfólk og persónar, sum veljarin sjálvur vísir á, hava tagnarskyldu, tá ið teir veita hjálp sbrt. stk. 1-3."

2. Í § 39 verður sum stk. 4 sett:
"*Stk. 4.* Um veljarin sigur seg ikki føran fyri at fylla út atkvøðuseðilin ella fylla út og undirskriva fylgibrævið sum ásett, kann hann fáa hjálp til hetta frá persóni, sum skal taka ímóti tilfarinum. Veljarin kann krevja, at ein persónur, sum veljarin sjálvur vísir á, eisini er til staðar í teimum førum, veljarin hevur tørv á hjálp."

3. Í §§ 45 og 48 verður "bót" broytt til: "sekt".

4. Í § 47, stk. 2 verður "bót ella hefti" broytt til: "sekt".

§ 3

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Landsstýrið ynskir, at skarin av fólki, sum hava valrætt til ymisk val í Føroyum, verður víðkaður. Eftir uppskotinum fáa tey, sum hava fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir verjumálslógini (Anordning nr. 397 af 20. april 2010 om ikrafttræden for Færøerne af værgemålsloven) § 6, valrætt til kommunuval.

Meginfelagið MEGD hevur heitt á landsstýrið um at bera so í bandi at broyta vallógirnar, soleiðis at tey, sum hava fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir verjumálslógini § 6, eisini fáa valrætt. Eftir stýrisskipanarlógini hevur persónur, sum er undir verjumáli og hevur fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir verjumálslógini § 6, ikki valrætt til Løgtingið. Stýrisskipanarlógin ásetur, hvør hevur valrætt til Løgtingið, men ásetur ikki hvør hevur valrætt til kommunuval. Kommunuvallógin ásetur tó, at tú skalt lúka treytirnar fyri valrætti og valbæri til Løgtingið, fyri at hava valrætt og valbæri til kommunuval. Sambært stýrisskipanarlógini og løgtingsvallógini hava persónar, sum eru undir verjumáli og hava fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir verjumálslógini § 6, ikki valrætt og valbæri til løgtingsval, og tískil hevur hesin bólkur av persónum ei heldur valrætt og valbæri til kommunuval.

Fyri at tey, sum hava fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir verjumálslógini § 6, kunnu fáa valrætt og valbæri til Løgtingið, krevst ein broyting í bæði stýrisskipanarlógini og løgtingsvallógini. Stýrisskipanarlógin er hinvegin ikki til hindurs fyri, at geva hesum persónum valrætt og valbæri til kommunuval.

Løgtingsvalnevndin hevur eisini heitt á landsstýrismannin um at fáa broytt nøkur viðurskifti í sambandi við løgtingsval. Løgtingsvalnevndin mælir eitt nú til, og uppskotið hevur eisini við sær, at tey, ið ikki eru før fyri at greiða atkvøðu einsamøll, kunnu krevja, at annar av teimum, sum er hjástaddur í sambandi við hjálpina við at greiða atkvøðu, er persónur, sum tey sjálvi velja. Ætlanin er, at hetta skal verða galdandi til kommunu- og løgtingsval og bæði fyri atkvøðu á sjálvum valstaðnum og viðvíkjandi brævatkvøðum.

1.2. Galdandi lóggáva

Valrættur og valbæri

Treytirnar fyri valrætti og valbæri til kommunuval í dag eru ásettar í kommunuvallógini § 1. Fyri at hava valrætt skalt tú:

- vera 18 ár og annars lúka treytirnar fyri valrætti og valbæri til Løgtingið,
- vera tilmeldaður fólkayvirlitið í avvarðandi kommunu í seinasta lagi 2 vikur undan valinum og
- framvegis vera búsitandi í kommununi valdagin.

Harafturat hava ríkisborgarar úr øðrum londum valrætt og valbæri til kommunuval, um so er, at teir hava havt fastan bústað í Føroyum seinastu 3 árini undan valinum.

Galdandi kommunuvallóg vísir til treytirnar fyri valrætti og valbæri til Løgtingið. Tað er ásett í stýrisskipanarlógini §§ 3 og 4 og í løgtingsvallógini §§ 2 og 2a, hvør hevur valrætt og valbæri til løgtingsval. Sambært hesum ásetingum hava tey, sum eru undir verjumáli og hava fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir verjumálslógini § 6, ikki valrætt, sbr. § 3 í stýrisskipanarlógini og § 2, stk. 1, í løgtingsvallógini.

Tey, sum hava valrætt til kommunuval, eru eisini valbær til kommunustýri, uttan so at tey eru óverdug vegna revsing, sbr. § 4, stk. 1 í stýrisskipanarlógini og § 2, stk. 2 í løgtingsvallógini.

Av tí at tey, sum eru undir verjumáli og hava fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir verjumálslógini § 6, ikki hava valrætt til kommunuval, eru tey ikki valbær til kommunustýri.

Hjálp til atkvøðugreiðslu
Á sjálvum valdegnum kann persónur, sum sigur seg ikki føran fyri einsamallan at greiða atkvøðu á fyriskrivaðan hátt, fáa hjálp til hetta frá einum av valnevndini til hetta endamál tilnevndum persóni, sbr. § 15, stk. 1, litra a.

Sambært § 15, stk. 1, litra b, kann persónur, sum er so mikið lamin ella á annan hátt so mikið brekaður, at hann ikki er førur fyri at koma sær inn í valhølið, krevja, at atkvøðugreiðslan fer fram beint uttan fyri valhølið, og skulu í hesum føri tveir av nevndarlimunum ella hjálparfólkunum vera hjástaddir, og um neyðugt veita honum hjálp við atkvøðugreiðsluni. Blindur ella sjónveikur persónur kann tó krevja hjálp frá persóni, ið veljarin sjálvur vísir á.

Valnevnd, valstýri og hjálparfólk
Kommunuvalið verður fyrireikað og fyriskipað undir leiðslu av eini valnevnd, sum verður sett av kommunustýrinum, sbrt. kommunuvallógini § 3. Kommunustýrislimur ella persónur, sum er uppskotin sum valevni, kann ikki vera limur í valnevndini. Í kommunum, sum ikki eru býttar upp í fleiri atkvøðuøki, fer atkvøðugreiðslan fram undir leiðslu av teirri valnevndini. Í kommunum við fleiri atkvøðuøkjum verður sett serligt stýri við valstýrarum fyri hvørt økið at stíla fyri valinum har, sbrt. kommunuvallógini § 8, stk. 3. Kommunustýrið kann eisini velja hjálparfólk at hjálpa til við valinum.

Vallisti
Kommunuvalið verður fyrireikað við listum yvir veljararnar. Vallistin verður gjørdur í seinasta lagi 1. september í valárinum og inniheldur teir veljarar, ið tá lúka treytirnar fyri valrætti. Kommunustýrið kann í seinasta lagi dagin fyri valið gera rættingar í vallistunum, um tað vísir seg, at onkur av órøttum er komin á listan, ella onkur rættkomin ikki er tikin við. Dømi um rættingar kunnu vera, at onkur er fluttur úr kommununi, er deyður ella hevur fingið rættarliga myndugleikan eftir verjumálslógini § 6 tiknan frá sær ella fingið hann aftur.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er, at tey, sum eru undir verjumáli og hava fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir verjumálslógini § 6, skulu hava valrætt til kommunuval og verða valbær til kommunustýri. Kommunuval verður týsdagin 10. november 2020, og tískil skal tað ganga skjótt, um hesin bólkurin av borgarum skal hava valrætt til kommunuvalið í ár.

1. januar 2020 vóru 17 persónar skrásettir í fólkayvirlitinum sum verandi undir verjumáli og hava fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir verjumálslógini § 6.

Tað finnast trý høvuðssløg av verjumálum:
- Vanlig verjumál, sbrt. § 5,
- verjumál, har rættarligi myndugleikin verður tikin frá persóninum, sbrt. § 6 og
- samverjumál, sbrt. § 7.

Tað eru einans tey, sum hava fingið rættarliga myndugleikan tiknan frá sær eftir verjumálslógini § 6, sum ikki hava valrætt og rætt at stilla upp til kommunuval. Tað er Føroya Rættur, sum kann taka rættarliga myndugleikan frá einum persóni. Frátøka av rættarliga myndugleikanum kann koma afturat einum vanligum fíggjarligum verjumáli, um tað er neyðugt fyri at forða fyri, at viðkomandi setur ogn, inntøku ella onnur fíggjarlig áhugamál í vanda, sum kann skerja viðkomandi munandi, ella at forða fyri fíggjarligari misnýtslu.

Í viðmerkingunum til § 6 í verjumálslógini stendur, at "det er hensigten, at denne type værgemål især skal anvendes over for de svage, der udviser aktiv adfærd. Hovedeksemplet er sindssyge, som under maniske perioder vil kunne træffe vidtrækkende skadelige økonomiske dispositioner, men der vil også kunne være behov for at fratage de aktive demente, psykisk udviklingshæmmede og skizofrene den retlige handleevne. Formålet med bestemmelsen er ikke kun at undgå, at de pågældende foretager uheldige aktive handlinger, men også at beskytte dem mod andres overtalelse, udnyttelse eller misbrug ved at indskrænke den svages mulighed for selv at disponere."

Tað er ein fólkaræðisligur spurningur, tá ið lóggivið verður um hvør hevur valrætt til fólkavald stýri. Um ikki mótstríðandi atlit tala ímóti tí, so vil landsstýrið, at skarin av persónum við valrætti gerst so stórur sum møguligt.

Landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum er av teirri fatan, at persónar, sum hava fingið rættarliga myndugleikan tiknan frá sær og eru undir verjumáli eftir verjumálslógini § 6, skulu hava valrætt til kommunuval, hóast hesir persónar ikki enn hava valrætt til løgtingsval. Stýrisskipanarlógin er ikki til hindurs fyri at geva hesum persónum valrætt til kommunuval. Hinvegin forðar stýrisskipanarlógin fyri, at hesin málbólkur fær valrætt til løgtingsval. Við at geva hesum bólki valrætt til kommunuval verða treytirnar fyri valrætti og valbæri ymiskar til ávikavist løgtingsval og kommunuval. Frammanundan er ávísur munur á:

- Ríkisborgarar úr øðrum londum hava valrætt og valbæri til kommunuval, um so er, at teir hava havt fastan bústað í Føroyum seinastu 3 árini undan valinum. Ríkisborgarar úr øðrum londum hava ikki valrætt til løgtingsval.
- Persónar, sum vegna útbúgving fyribils hava tilhald uttan fyri Føroyar, hava valrætt til Løgtingið, um so er at teir frammanundan fráflyting úr Føroyum hava verið skrásettir í fólkayvirlitinum í Føroyum í minsta lagi 5 ár tilsamans. Tilhaldið uttan fyri Føroyar skal tó ikki hava verið longri enn 8 ár. Hesir persónar hava ikki valrætt til kommunuval.

Frátøka av rættarliga myndugleikanum kann koma afturat einum vanligum fíggjarligum verjumáli, um tað er neyðugt fyri at forða fyri, at viðkomandi setur ogn, inntøku ella onnur fíggjarlig áhugamál í vanda, sum kann skerja viðkomandi munandi, ella fyri at forða fyri fíggjarligari misnýtslu. Persónur, hvørs rættarligi myndugleiki er frátikin, er ómyndugur og kann tí ikki gera fíggjarligar avtalur, sum eru bindandi uttan so, at annað er avgjørt. Mett verður ikki, at frátøka av rættarliga myndugleikanum í sambandi við eitt verjumál eftir verjumálslógini § 6 er til hindurs fyri, at viðkomandi persónur fær valrætt. Kommunuvallógin hevur ásetingar um, hvussu hjálp kann veitast til persónar, sum siga seg ikki førar fyri at greiða atkvøðu á vanligan hátt. Um persónur møtir til val og sigur seg ikki føran at atkvøða sum ásett, fær viðkomandi hjálp til hetta. Hinvegin er tað ein treyt, at veljarin greitt og skilliga sjálvur kann siga tí persóni frá, sum skal hjálpa honum, hvørjum hann ætlar at atkvøða fyri.

Endamálið við lógaruppskotinum er eisini at virða politisku rættindini hjá fólki, sum bera brek, og møguleikan hjá teimum at brúka hesi rættindi á jøvnum føti við onnur. Í ST sáttmálanum um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, hava Føroyar bundið seg til at tryggja, at fólk, ið bera brek, fult og heilt fáa verið við í politiskum og almennum lívi á jøvnum føti við onnur, beinleiðis ella umvegis umboð, ið tey sjálvi velja sær, sbrt. grein 29, litra a, í sáttmálanum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Skotið verður upp at persónur, ið er undir verjumáli og hvørs løgræði er frátikið eftir verjumálslógini § 6, fær valrætt til kommunuval, treytað av at viðkomandi lýkur treytirnar fyri valrætti annars.

Skotið verður eisini upp at ein veljari, sum ikki kann greiða atkvøðu sum ásett, kann krevja, at annar av persónunum, sum veitir honum hjálp, er ein hann sjálvur vísir á.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið varð sent til ummælis tann 12. juni 2020 hjá MEGD, Familjufyrisitingini, løgtingsvalnevndini, Almannaverkinum, sendistovum Føroya, Kommunufelagnum og stjórnarráðunum. Lógaruppskotið varð eisini lagt alment út á heimasíðu Umhvørvis- og vinnumálaráðsins. Tá ið freistin at koma við viðmerkingum var úti tann 10. juli 2020, vóru viðmerkingar frá Almannamálaráðnum, Almannaverkinum, Familjufyrisitingini, Føroya Blindafelag, Heilsumálaráðnum, Hoyr, Javna, Kommunufelagnum, løgtingsvalnevndini og MEGD.

Føroya Blindafelag, Heilsumálaráðið, løgtingsvalnevndin, Familjufyrisitingin, Kommunufelagið, Almannaverkið og Almannamálaráðið hava ikki viðmerkingar til lógaruppskotið.

MEGD vísir á, at tað er ein mannarættur at kunna velja til løgtings- og kommunuval og tískil fegnast MEGD um, at áheitanin frá MEGD verður gingin á møti, so fólk, sum eru undir verjumáli og hava fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir § 6 í verjumálslógini fáa valrætt til kommunuval. MEGD heitir á Løgtingið um at gera somu broyting í stýrisskipanarlógini, soleiðis at hesir persónar eisini fáa valrætt til løgtingsval. MEGD tekur undir við, at veljari, sum ikki kann greiða atkvøðu sjálvur, fær møguleika at vísa á ein persón, sum hann sjálvur velur, at hjálpa sær við atkvøðugreiðsluni. MEGD mælir tó til, at sjónveik sjálvi kunnu gera av, hvønn tey vilja hava við sær inn, uttan at tað er neyðugt við hjálp frá valnevndarlimum ella hjálparfólki. MEGD heitir eisini á myndugleikar at gera neyðugar fyriskipanir í sambandi við val, sum tryggja, at fólk kunnu velja sjálvstøðugt uttan at noyðast at biðja um hjálp frá øðrum. MEGD mælir til, at myndugleikin tryggjar atkomu í rullistóli, innrættar ein rúmligan kliva til rullistólar, ger vallistar við mynd av valevnunum, ger vallistar í blindskrift. Til hetta er at siga, at tað eru kommunustýrini, ið avgera, hvar atkvøðugreiðslan fer fram. § 11 í kommunuvallógini ásetur, at atkvøðurúmini skulu vera útgjørd við tí, sum er neyðugt fyri at atkvøða. Umhvørvis- og vinnumálaráðið fer at kanna, um tað er neyðugt at broyta vallóggávuna, soleiðis at atkvøðurúmini og atkvøðutilfarið gerst lættari at nýta hjá sjónveikum o.ø.

Felagið Hoyr metir tað vera ein sjálvsagdur rættur hjá øllum at hava valrætt og fegnast tí um lógaruppskotið. Í Hoyr fegnast tey eisini um broytingina í § 15 í vallógini, men felagið ynskir, at valið fer fram í hølum, sum eru atkomulig hjá øllum og at atkvøðuseðlarnir hava mynd av valevnunum. Felagið ynskir eisini, at tað er møguligt at nýta teldutøkar atkvøðuseðlar. Sum omanfyri nevnt, fer Umhvørvis- og vinnumálaráðið undir at kanna, um tað er neyðugt at broyta vallóggávuna hesum viðvíkjandi.

Javni fegnast um og tekur undir við lógaruppskotinum. Javni sær tað sum ein demokratiskan trupulleika, at øll ikki hava valrætt, hóast tey ikki megna nøkur viðurskifti sjálvi. Javni væntar og vónar, at stýrisskipanarlógin verður broytt, soleiðis at øll eisini hava valrætt og eru valbær til løgtingsval. Javni fegnast um, at veljarin kann krevja, at annar av tveimum persónum, sum veitir hjálp við atkvøðugreiðsluni, kann vera ein, sum veljarin sjálvur vísir á.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið gevur teimum borgarum, sum eru undir verjumáli og hava fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir Værgemålsloven § 6, valrætt og valbæri til kommunuval.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar, sum Føroyar hava á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið er í samsvari við sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, sum varð góðkendur av Løgtinginum tann 13. mai 2009. Sáttmálin fekk gildi fyri Danmark og harvið eisini fyri Føroyar tann 23. august 2009. Sáttmálin áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek. Sáttmálin er kunngjørdur við *Bekendtgørelse nr. 20 af 15. november 2017 af FN-konvention af 13. december 2006 om rettigheder for personer med handicap*.

Lógaruppskotið skal tryggja fólki, sum bera brek, politisk rættindi og møguleikan hjá teimum at brúka hesi rættindi á jøvnum føti við onnur. Í ST sáttmálanum um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, hava Føroyar bundið seg til at tryggja, at fólk, ið bera brek, fult og heilt fáa verið við í politiskum og almennum lívi á jøvnum føti við onnur, beinleiðis ella umvegis umboð, ið tey sjálvi velja sær, sbrt. grein 29, litra a, í sáttmálanum.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið elvir ikki til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið áleggur ikki skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunurnar.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Ja	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Við broytingini í *nr. 1* fær persónur, sum eru undir verjumáli og hevur fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir anordning nr. 397 af 20. april 2010 om ikrafttræden for Færøerne af værgemålsloven § 6, valrætt til kommunuval og verður harvið eisini valbærur til kommunustýri, um hann annars lýkur treytirnar fyri valbæri og valrætti til kommunuval.

Skarin av persónum, sum hava valrætt og eru valbær til kommunuval verður sostatt víðkaður til eisini at fevna um hesar persónar. Tann 1. januar 2020 vóru tað 17 persónar, sum høvdu fingið rættarliga myndugleikan frátiknan eftir verjumálslógini § 6. Persónar, sum eru undir vanligum verjumáli eftir verjumálslógini § 5 ella undir samverjumáli eftir verjumálslógini § 7 hava valrætt og eru valbær í dag og eru tí ikki fevnd av hesi broyting.

Í *nr. 2* er § 4, stk. 5 umorðað, soleiðis at feilir í vallistum kunnu rættast til og við valdagin. Í sambandi við løgtingsval kunnu tílíkir feilir rættast til og við valdagin, og mett verður at hetta eisini eigur at lata seg gera til kommunuval.

Galdandi kommunuvallóg ásetur, at bygdarráðið/býráðið á fundi í seinasta lagi dagin fyri valið kann gera rættingar. Við broytingini verður møguligt hjá kommununum at gera rættingar til og við valdagin. Harafturat verður tað ikki longur neyðugt at hava kommunustýrisfund til at rætta í vallistanum. Soleiðis sum ásetingin nú er orðað, kann umsitingin eisini gera rættingar.

Í *nr. 3* verður verandi § 15 í kommunuvallógini broytt, soleiðis at tað er greitt, at tað ikki einans eru blind og sjónveik, ið kunnu fáa hjálp til at atkvøða, frá einum persóni tey sjálvi vísa á. Skotið verður upp at veljari, ið møtir til val og sigur seg ikki føran at atkvøða sum ásett, kann krevja, at annar persónurin, sum veitir hjálp, er ein persónur, viðkomandi sjálvur vísir á. Tað er ein treyt, og tað er neyðugt fyri at kunna veita neyðugu hjálpina, at veljarin greitt og skilliga kann boða teimum persónunum frá, sum hjálpa við atkvøðugreiðsluni, hvørjum veljarin ætlar at atkvøða fyri.

Í galdandi lóg er tað soleiðis, at tey, sum eru blind ella sjónveik, eru tann einasti bólkurin, sum kann krevja hjálp frá persóni, ið veljarin sjálvur vísir á. Øll onnur kunnu einans fáa hjálp til at greiða atkvøðu á fyriskrivaðan hátt, frá einum av valnevndini til hetta tilnevndum persóni ella frá tveimum úr valnevndini ella hjálparfólkum.

Við broytingini verður tað greitt, at tað nú altíð skulu vera tveir persónar til staðar í sambandi við hjálpina, tá ið ein veljari sigur seg ikki føran fyri at velja sum ásett, og at hann hevur tørv á hjálp. Antin tveir úr valnevndini, valstýrinum ella hjálparfólk ella ein úr valnevndini, valstýrinum ella hjálparfólk og ein persónur, sum veljarin sjálvur vísir á.

Hefti sum revsing varð strikað við einari broyting í revsilógini í 2010, tískil verður tað strikað í *nr. 4*.

Til § 2
Við broytingini í *nr. 1* verður verandi § 26 í løgtingsvallógini broytt, soleiðis at tað er greitt, at tað ikki einans eru blind og sjónveik, ið kunnu fáa hjálp til at atkvøða, frá einum persóni tey

sjálvi vísa á. Skotið verður upp at veljari, ið møtir til val og sigur seg ikki føran at atkvøða sum ásett, kann krevja, at annar persónurin, sum veitir hjálp, er ein persónur, viðkomandi sjálvur vísir á. Tað er ein treyt, og tað er neyðugt fyri at kunna veita neyðugu hjálpina, at veljarin greitt og skilliga kann boða teimum persónunum frá, sum hjálpa við atkvøðugreiðsluni, hvørjum veljarin ætlar at atkvøða fyri.

Við broytingini verður tað greitt, at tað altíð skulu vera tveir persónar til staðar í sambandi við hjálpina, tá ið ein veljari sigur seg ikki føran fyri at velja sum ásett og at hann hevur tørv á hjálp. Antin tveir úr valnevndini, valstýrinum ella hjálparfólk ella ein úr valnevndini ella hjálparfólk og ein persónur, sum veljarin sjálvur vísir á.

Í *nr. 2* verður skotið upp, at veljarin eisini kann fáa neyðuga hjálp, tá ið veljarin greiðir atkvøðu við brævi. Í galdandi lóg er ikki heimild at slaka í reglunum, tá ið talan er um atkvøðu við brævi. Skotið verður upp, at veljarin eisini kann velja, at persónur, sum veljarin vísir á, er til staðar í sambandi við atkvøðu við brævi, soleiðis at tað bæði er ein myndugleikapersónur og viðkomandi, sum veljarin vísir á. Tað er tó ein treyt, at veljarin ikki er førur fyri at fylla út atkvøðuseðilin ella fylla út og undirskriva fylgibrævið. Broytingin í nr. 2 verður einans gjørd í løgtingsvallógini, men fær eisini virknað til kommunuval vísandi til, at ásetingarnar í løgtingsvallógini um atkvøðu við brævi eisini eru galdandi til kommunuval, sbrt. kommunuvallógini § 14.

Broytingarnar í *nr. 3 og nr. 4* eru uttan stórvegis týdning. "bót" verður broytt til "sekt" í § 45, § 47, stk. 2 og § 48 vísandi til at tað er óheppið, at ein peningalig revsing hevur tvey ymisk heiti í føroyskum rættarreglum. Hetta er óneyðugt og kann elva til óvissu um, hvørt bót er tað sama sum sekt. Løgmansskrivstovan mælir til at nýta orðið sekt í lóggávuni. Í § 47, stk. 2 verður "hefti" strikað vísandi til, at hefti sum revsing varð strikað við einari broyting í revsilógini í 2010.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 3. august 2020

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Føroya Blindafelag
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá MEGD
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá Heilsumálaráðnum
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar frá Landsbanka Føroya

Fylgiskjal 6: Hoyringarsvar frá Familjufyrisitingini
Fylgiskjal 7: Hoyringarsvar frá Hoyr
Fylgiskjal 8: Hoyringarsvar frá Kommunufelagnum
Fylgiskjal 9: Hoyringarsvar frá Javna
Fylgiskjal 10: Hoyringarsvar frá Almannaverkinum
Fylgiskjal 11: Hoyringarsvar frá Almannamálaráðnum